


Afstöðumynd af Drekasvæðinu - kortlagt svæði er innan gulu strikalínanna.

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 12 - 2012

# Íslendingar ætla sær part av grønlendska ævintýrinum

Íslendingar ætla sær ikki at sita hendur í favn, nú tosað verður um møguliga náms- og oljuvinnu í Eysturgrønlandi, og tí er vinnufelagið við Eyðafjørðin á Norðurlandinum farið undir eitt átak, sum skal kunna áhugafeløg um teur møguleikar, sum eru í økinum. Átakið skal vísa, at økið kring Eyjafjørðin, har Akureyri er, kann eisini vera áhugavert í sambandi við ætlaðu oljuleitingarnar á Drekaleiðini. Þorvaldur Lúðvík Sigurjónsson, sum er stjóri í vinnufelagnum við Eyjafjørðin, sigur við Morgunblaðið, at kunningarátakið fer at kosta millum 15 og 20 mnilliónir íslendskar krónur. -Landafrøðiliga liggja vit væl fyri, og harafturat er søguligt tilknýti millum Akureyri á Grønland á eitt nú sjúkrahúsøkinum, innan ídnaðin og innan loftferðslu, sigur stjórin við blaðið. Hann vísir á, at fleiri verkætlanir innan námsvinnuna eru í gongd í Grønlandi, og at umleið 30 verkætlanir liggja á tekniborðinuim. Íslendsku myndugleikarnir hava júst útlutað leiðiloyvi á Drekaleiðini, og stjórnin í Reykjavík hevur sagt, at í hesum sambandi verður neyðugt at fremja útbyggingar norðanfyri til at røkja tær tænastur, sum eru tengdar at leinting.